# B68

# Alt er nýtt á Svangaskarði

**Toftа Ítróttafelag, B68**
**FO-650 Toftir**
**www.b68.fo**

**STOVNAÐ**
**21. desember 1962**

**FORMAÐUR**
**Jógvan Højgaard**

**MEISTARAR (3)**
**1984, 1985, 1992**

**STEYPAVINNARAR**
**ongantíð**

**GREIPUVINNARAR**
**ongantíð**

**Í 1. DEILD (25 ár)**
**1981-2004, 2006, 2008-**

**Í EUROPA (4)**
**Meistarakappingin 1993/94**
**Intertoto 1996/97, 2001/02, 2002/03**

**Setningurin hjá Bill Jacobsen er við nýggjum liði at sleppa B68 undan títtu skiftingini millum bestu og næstbestu deildina**

Tað plagar at vera soleiðis, at uppflytararnir eru nøgdir við at sleppa undan at flyta niður aftur beinanvegin. B68 flutti niður í 2004. Í 2005 vunnu toftamenn seg uppaftur í bestu deildina, men har var steðgurin bara eitt ár. Í 2007 var B68 aftur í 1. deild, og aftur hesa ferð eydnaðist tað at gera skjótt av.

Útskiftingarnar hava verið nógvar. Ikki færri enn níggju teirra, sum vóru við til at manna besta liðið í fjør, eru ikki við í kappingini um plássini í ár. Fleiri teirra vóru millum stuðulsspælararnar. Men kortini tykist tað sum um, at Bill Jacobsen er við at spæla lið saman, sum hevur møguleika til bæði at sleppa undan niðurflyting og kanska at standa seg betri enn so. Tað halda tey í B68 í hvussu so er, at tað er møguleiki fyri.

Vlada Filipovic er nýggjur málverji, Jacob Bymar, sum Bill Jacobsen í síni tíð í Esbjerg hitti, og sum áður hevur roynt seg í Klaksvík, er fremsta álopsvápnið, og umframt teir báðar eru seks aðrir útlendingar við í kappingin um plássini á besta liðnum. Ásetingarnar siga, at tað er ikki loyvt at hava fleiri enn fýra útlendskar spælarar á vøllinum í senn, men av tí at Vlada Filipovic og Alex Troleis hava búð í Føroyum í meiri enn trý ár, telja teir ikki við í útlendingakvotuni. Tískil mugu tveir av seks útlendingum sita uttanfyri hvørja ferð.

Fýra spælarar eru úr Senegal, og í vinardystunum hevur tað verið eyðsýnt, at onkrir teirra fara at styrkja væl um liðið.

Arnbjørn Danielsen er superveteranur, og á Svangaskarði hava teir ikki heilt avskrivað, at Øssur Hansen kanska eisini fer at hjálpa til, hóast tað í vetur hevur ljóðað, at hann hevur sett skógvarnar á hillina. Aðrir spælarar við royndum frá Formula fótbólti eru Jann Ingi Petersen, Jóhan Petur Poulsen, Jóhan Dávur Højgaard og Kristian Anton Andreasen.

Blaðungir og sera evnaríkir eru Remi Langgaard og Jóan Símun Edmundsson. Onkrir av hinum royndu seg eitt sindur í fjør: André Olsen, Jonleif Højgaard, Gestur Lómstein, Niklas Poulsen, Oddur Højgaard, Emil Olsen og málverjin Petur Meinhard Magnussen.

B68 eigur trý FM heiti – í 1984, 1985 og 1992 – og dreymurin hjá toftamonnum er sjálvandi aftur at vera við í kappingini um FM. Í fyrsta umfari snýr tað seg tó um at finna fótafesti í Formula deildini og at sleppa undan niðurflyting, meðan evnaríkir dreingir, sum eru uppvaksnir í felagnum, vinna sær royndirnar, ið eru so neyðugar.

Nú fæst at síggja, hvussu tað fer at eydnast, og um ungu menninir fara at støðast á Svangaskarði. Tað valdast ikki minst, hvussu tað fer at hilnast hjá B68, har tað mesta í ár er nýtt.



| **MÁLVERJAR** | Áður spælt við |
|---|---|
| Vlada Filipovic | Skála, VB/S |
| Petur Meinhard Magnussen | |

| **VERJA** | |
|---|---|
| Alex Troleis | |
| Pape Landing Sambou | |
| Arnbjørn Danielsen | B36 |
| Gestur Lómstein | |
| Jóhan Petur Poulsen | Esbjerg |
| Niklas Poulsen | |
| Oddur Hjøgaard | |
| Ralph van Dooren | Hjørring IF |

| **MIÐVØLLUR** | |
|---|---|
| Remi Langgaard | |
| Andre Olsen | |
| Kristian Anton Andreasen | |
| Jann Ingi Petersen | Fremad Amager |

| **MIÐVØLLUR** | Áður spælt við |
|---|---|
| Ndende Adama Gueye | |
| Jóhan Dávur Højgaard | GÍ |
| Badara Diedhiou | |
| Emil Olsen | |

| **ÁLOP** | |
|---|---|
| Jacob Bymar | KÍ, Fanø |
| Jonleif Højgaard | |
| Jóan Símun Edmundsson | |
| Ameth Keita | |

**TILGONGD**
Vlada Filopovic
Pape Landing Sambou
Jacob Bymar
Jóhan Petur Poulsen
Ralph van Dooren
Ndende Adama Gueye

**TILGONGD**
Ameth Keita
Badara Diedhiou

| **FRÁGONGD** | |
|---|---|
| Gunnar á Steig | EB/Streymur |
| Øssur Hansen | Givin |
| Bogi Petersen | Givin |
| Ove Magnussen | av landinum |
| Kári Hansen | NSÍ |
| Alexandro Castilho | Brasil |
| Dánial Hansen | NSÍ |
| Jósup Hendriksen | KÍ |

**VENJARI**
Bill Mc. Leod Jacobsen

**HJÁLPARVENJARI**
Oddmar Andreasen